VIÐMERKINGAR

# Sjúklingurin stóri taparin!

**Jana H. Dalsgaard**
*forkvinna í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar*



***Skal Sjúkrarøktin takast frá serkønu sjúkrarøktarfrøðingunum á Føðideildini og latast ljósmøðrum, ið ikki hava neyðuga førleikan, at umsita?***

***Hvønn týðning hevur uppbygd og ment servitan fyri kvalitetin í sjúkrarøktini og trygdina hjá sjúklinginum?***

***Hvussu verður servitan vird og raðfest á Landssjúkrahúsinum?***

Hetta eru nakrir av spurningunum vit seta okkum í hesum døgum!

"So er aftur stríð á Landssjúkrahúsinum, hvat klandrast tit nú um"? spyrja mong í hesum døgum. Eg kenni meg noydda at greiða gjølla frá, og kann við røttum siga, at tað heldur ikki hesaferð er Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar ella limir tess, ið hava biðið um hendan óneyðuga ófrið.

Tey allarflestu hava, eins og eg, ikki enn gloymt pínufulla málið á medisinsku deild B6 fyri bert fáum árum síðani, tá sjúkrarøktarfrøðingar í eini roynd at betra ótolandi umstøðurnar hjá bæði sjúklingum og starvsfólki, vegna m.a. manglandi resoursir, fingu eina sera ósømuliga viðferð frá leiðsluni. Málið, ið mundi endað við, at øll starvsfólkini fóru í einum, og deildin bleiv niðurløgd, um ikki Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar í evstu løtu, forðaði fyri tí. Hetta mettu mong við okkum, átti ikki at komið fyri og slíkt má ongantíð henda aftur.

Tá Kardiologiska starvsstovan varð sett á stovn, vóru tað m.a. tveir sjúkrarøktarfrøðingar við servitan, ið vóru við til at byggja hesa deildina upp. Tær vóru serfrøðingar á økinum, og høvdu servitan á ikki minni enn 6 ymiskum sergreinum. Til samanberingar kann eg nevna, at tá tær skuldu í feriu og avloysari fáast úr Danmark var ongin at fáa, ið hevði meira enn tvær av neyðugu sergreinunum, so annahvørt mátti sendast boð eftir fleiri fólkum úr Danmark, ella máttu kanningarnar á teimum 4 sergreinunum bíða til onnur av teimum var aftur til arbeiðis, Hvussu virdi Landssjúkrahúsið arbeiðið, sum hesar báðar gjørdu, og hvussu virdu tey hesa servitan?

Vit hava heldur ikki gloymt Scopimálið. - Scopideildin, sum var ein minsturdeild, eins og Kardiologiska Starvsstovan og Føðideildin, við trimum sjúkrarøktarfrøðingum, sum vóru serfrøðingar á tí økinum, tær bygdu deildina upp, og hava gjørt eitt megnar arbeiði. Ikki minst hava tær harafturat spart Landssjúkrahúsinum nógvan pening gjøgnum árini, við at ganga í vakt "ókeypis". Her mátti partú pilkast við, hvat gjørdist úrslitið? minnast tit tað, kundi hetta kallast sparing ella møguliga menning? Hvussu virdi Landssjúkrahúsið arbeiðið, sum hesir serfrøðingar gjørdu, og hvussu virdu tey teirra servitan?

Feskasta dømið um vantandi virðing fyri servitan hjá sjúkrarøktarfrøðingum á Landssjúkrahúsinum var tá skurðdeild A3 lat aftur stutt fyri jól í fjør! Varð serlæknin í kvinnusjúkum eftirspurd? A3 var m.a. serdeildin fyri gynækologi og obstetrik. Tað var á A3 at m.a.sjúkar barnakonur lógu, har konur liggja nú á Føðideildini. Umframt tað, var deildin útbúgvingardeild fyri sjúkrarøktarfrøðingar bæði í kirurgi og gynækologi og obstetrik. Hvussu kemur servitanin hjá sersjúkrarøktarfrøðingunum, ið bygdu upp og mentu sjúkrarøktina á A3 kvinnuligu sjúklingunum í dag tilgóðar?

Sami "arkitektur", sum hevði ein fingur í spælinum í øllum hesum málum hevur nú aftur " rørt í pottinum" og hesaferð er tað Føðideildin, ið stendur fyri skoti. Nú skal beinast fyri servitanini á Føðideildini! - einasta grundgeving sigst vera at ljósmøður ynskja tað. Hvar eru tey fakligu argumentini? Hvat við trygdini hjá sjúklinginum?

***Føðideildin ein fyrimyndarlig deild - hví broyta tað ið virkar sera væl?***

Føðideildin er ein fyrimyndarlig deild, og eigur avgjørt ikki at rørast !

Og sum sjúkrarøktarfrøðingur á Føðideildini sjálvar skriva í skrivi nú um dagarnar; citat;

*"Vit hava í Føroyum í dag, eftir okkara bestu sannføring, eina so flotta heilsutænastu til hesar barnafamiljur, at vit næstan kundu farið í onnur lond og selt skipanina, sum eitt nú fiskidagaskipanin verður seld. Vit kunna í øllum førum erpa okkum av nógv lægri, um ikki lægst barnadeyða tað fyrsta liviárið hjá barninum, tá vit samanbera við hini norðanlondini. Tað átti at sagt politikarunum, at her er ein skipan, vit eiga at vera varin við at broyta, og um vit skulu broyta eigur tað at gerast so tilvitað, at vit kenna meginpartin av ringvirkningunum gjøgnum alla skipanina og samfelagið sum heild, áðrenn broytingin verður sett í verk. Spurningurin er, fara vit at megna at varveita positivu útlitini fyri okkara dýrabarasta tilfeingi, nevniliga børnini".*

***Uppskotið hjá "Leiðsluni" Ein háðan ímóti sersjúkrarøktini og sjúkrarøktarfrøðingum, ið hava bygt upp og mennt hesa servitan - Sjúklingurin ikki í miðdeplinum!***

Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar mótmælir harliga ætlaðu umleggingini á Føðideildini, ið er onki minni enn ein háðan ímóti sjúkrarøktini og sjúkrarøktarfrøðingum og setur trygdina hjá sjúklinginum í vanda. Nú er niðurgerðingin av servitan hjá sjúkrarøktarfrøðingum fullkomin, tí "Leiðslan" á Landssjúkrahúsinum ætlar at siga 8 sersjúkrarøktarfrøðingar á Føðideildini úr starvi og seta ljósmøður, sum ikki eru sjúkrarøktarfrøðingar áðrenn og tí ikki hava neyðugan førleika, inn á deildina í teirra stað, at yvirtaka sjúkrarøktina og sjúkrarøktarleiðsluna. (Næstan allar ljósmøðurnar á LS hava útbúgving úr Danmark og hava tí ikki útbúgving sum sjúkrarøktarfrøðingar áðrenn). Danmark er einasta stað, har tað ber til,at læra til ljósmóðir uttan at vera sjúkrarøktarfrøðingur áðrenn, alla aðrastaðni er hetta eitt krav. Tað er ikki nógmikið við teimum ljósmøðrum, ið longu vóru í starvi, tað skulu fleiri til svaraði leiðslan starvsfólkunum á Føðideildini á fundi 8. mars, tað er undirritaða vitni til.

Einasta argumentið hjá leiðsluni at fremja hesa broyting er, at ljósmøður ynskja tað. Tað hevur alt tað eg veit um verið arbeiðsloysi millum ljósmøður í Føroyum. Um ljósmøður ynskja at arbeiða sum sjúkrarøktarfrøðingar,ella at yvirtaka sjúkrarøktina krevst tað, at tær útbúgva seg fyrst til sjúkrarøktarfrøðing og fáa løggilding sum sjúkrarøktarfrøðingur!

Teirra fakliga grundgeving fyri at yvirtaka sjúkrarøktina er, at tær sum lesandi hava verið í praktikk í 6 vikur á neonatalari deild og verið til próvtøku í tí. Hetta meta tær vera nógmikið -. Hetta er sjálvsagt ikki nóg mikið og heilt burtur við!- Um vit argumenteraðu líka óseriøst, kundu vit mótsatt ført fram, at tá vit sum lesandi vóru í praktikk á gynækologiskari-, obstetretriskari- og føðideild í fleiri mánaðir í lestrartíðini(eg sjálv var í 4 mánaðir) og til próvtøku í øllum hesum sum viðvíkur føðingini, og harafturat hava sjúkrarøktarfrøðingar á Føðideildini altíð verið við til hvønn einasta føðsil, ja, so kunnu vit bara yvirtaka føðslarnar- tað hevði verið sparing ! Men, hetta høvdu vit sjálvsagt ikki boðið føðikonunum, og so mikið av virðing hava vit sum fakbólkur fyri arbeiðinum og vitanini hjá ljósmøðrum, tí vænta vit eisini teirra virðing fyri okkara servitan og erfaring sum sjúkrarøktarfrøðingar og ikki minst trygdini hjá sjúklinginum. Onnur samanbering er, um ein tannlækni verður settur at arbeiða sum lækni, ein lærari í Vøggustovu ella barnagarði ella ein pædagogur sum lærari í t.d. matema-



*Framhald á næstu síðu*